# Kan Du Danse? er ikki snýt

**Í kvøld skal føroyska Vígdis aftur royna seg í sendingini Kan Du Danse? Men í donskum miðlum er rok um sendingina, nú svarar Kanal 5 aftur: Vit kundu ikki droymt um at snýtt!**

SJÓNVARP
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í húsumborna dagblaðnum 24 Tímar verður í gjár skrivað, at fleiri av luttakarunum í finaluni í Kan Du Danse? eru valdir út frammanundan. Men hetta er sambært Kanal 5 ikki so. Blaðið skrivar, at útvaldir dansarar vórðu uppringdir og bidnir um at luttaka. Hesir fingu harafturat frammanundan avtalaða tíð at møta upp og sluppu frá at standa í bíðirøð eins og hini. Eisini verður sagt, at fleiri av hesum dansarum hava fingið at vita, at dómsnevndin visti at tey vóru betur enn tað, sum tey høvdu víst, so tey sluppu víðari.

24 tímar byggir sína søgu á útsagnir frá ónevndum dansarum, ið ikki eru komnir víðari í sendingini, og vísir á, at dómarnir kenna fleiri av dansarunum frammanundan. Blaðið nevnir tvey dømir har dansarar hava arbeitt saman við Toniuh Pedersen og Niclasi Bendixen.

Kanal 5 noktar, at talan er um snýt og vísir á, at talan er um eina seriøsa dansikapping við fýra av teimum best egnaðu dómarunum í Danmark.

At nakrir av dómarunum hava arbeitt saman við onkrum dansara slepst neyvan undan, men í teimum førunum har dómarar hava kent onkran dansara serliga væl, hevur dómsnevndin roynt at latið hinar dómararnar tikið støðu, greiðir ein av dómarunum Kenneth Kreutzmann frá.



*Fleiri eru av teirri fatan, at talan er um snýt í dansikappingini hjá TvDanmark*

Niclas Bendixen viðgongur, at hann kennir nakrar av dansarunum, ið eru komnir víðari, men sigur, at hann eisini kennir nógvar dansarar, sum ikki komu víðari.

- Tey flestu kenna hvør annan í danska dansiídnaðinum, so tað er einki serligt í hesi støðuni, men um onkur kennir seg viðfarnan órættvíst, so er tey vælkomin at seta seg í samband við meg, so skal eg greiða teimum frá, hví tey ikki eru komin víðari, sigur Niclas Bendixen.

Starvslýsing

## Tveir Pedagogar til Trivnaðartænastuna

**Vit søkja eftir tveimum pedagogum til Bústovnin og Sambýlið á Rúnarvegi í Runavík**

**Vit søkja eftir fólki**
- við útbúgving sum pedagogur
- sum hava evni og vilja til at samstarva og samskifta við avvarðandi hjá búfólkunum og við starvsfelagar
- sum hava áhuga í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum á arbeiðsplássinum
- sum eru opin fyri nýhugsan

**Vit bjóða**
tvey spennandi og avbjóðandi størv, sum millum annað fevna um at vegleiða búfólkið í øllum tí, sum tey hava tørv á, og at menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi. At skapa trivnað og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkunum menningarmøguleikar og saman við teimum skipa innihaldið í gerandisdegnum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 1. desember 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstørv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Størvini eru tænastumannastørv. Tey verða sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag og lønt á lønarstigunum 24, 25, 27, 28 og 30 til 33. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Bústovnurin og Sambýlið á Rúnarvegi í Runavík.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til Oddfríðu Højgaard, leiðara, á tlf. 226121.

Send eina umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum til:

Bústovnurin á Rúnarvegi
Stílað: Leiðarin
Rúnarvegur 6
620 Runavík

**Umsóknarfreistin er 6. november 2006.**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

Starvslýsing

## Avloysari til Stuðulstænastuna

Stuðulstænastan søkir eftir einum stuðli til brúkara í Vágum við ALS vøddasvinn. Stuðulin fer í samstarv við aðrar stuðlar at arbeiða í skiftandi vaktum alt døgnið. Starvið er normerað til umleið 20 tímar um vikuna at byrja skjótast gjørligt.

**Førleikakrøv:**
Stuðulstænastan ynskir ein stuðul við viðkomandi útbúgving t.d. heilsuatstøðing ella líknandi útbúgving. Um eingin umsøkjari er við útbúgving, kann starvið verða sett við øðrum umsøkjara.

**Vit vænta at tú**
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Ert tolin og hevur eina positiva menniskjafatan
- Kann samstarva í einum toymi

**Lønar- og setánartreytir:**
Starvið verður sett skjótast tilber.

Talan er um tíðaravmarkað starv í Nærverkinum við tænastu innan Stuðulstænastuna. Lønin verður ásett eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum ikki primert eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá Føroya Pedagogfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Petru Joensen ella Odu Jóhansdóttir á tlf. 354020.

Send eina umsókn við møguligum prógvum, viðmælum og frágreiðing um royndir til:

Stuðulstænastan
Stílað: Oda Jóhansdóttir
Løkjatúni 1
FO-160 Argjum

**Umsóknarfreistin er 6. november 2006.**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**